# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Minnilutastjórn - møguleikar og fortreytir

Í blaðnum í dag hevur Bogi Eliassen, stjórnmálafrøðingur, metingar um dagsaktuellu politisku støðuna, nú landsstýrið hevur mist parlamentariska meirilutan og ætlar at halda fram sum minnilutalandsstýri. Greinin er áhugaverd, tí hon ikki bert viðger ymsu parlamentarisku møguleikarnar, hon viðger eisini nakrar fortreytir fyri einum minnilutalandsstýri.

Taka vit møguleikarnar fyrst, so verður víst á, at Sambandsflokkurin og Fólkaflokkurin hava sagt, at nýggj samgonga eigur at verða skipað, og at løgmaður eigur at leggja frá sær. Hinvegin verður nýval ikki mett sum ein møguleiki, tað er heilt einfalt ov stutt síðan val var seinast. Tað er áhugavert, at stjórnmálafrøðingurin ikki metur, at stóru andstøðuflokkarnir veruliga meina tað, teir siga. Heldur vilja teir hava eina kaoskenda minnilutastjórn eina tíð, tí hetta vildi givið møguleika at fáa ein meiriluta í tinginum fyri málum, sum samgongan ikki tekur undir við. Soleiðis kunnu teir fáa samgonguna at føra politikk, sum hon í roynd og veru ikki tekur undir við. Ymiskt kundi bent á, at hendan metingin av støðuni hjá teimum báðum stóru andstøðuflokkunum, er bein.

Vit hava áður her nevnt, at samgongan ikki bara hevur trupulleikar av Gerhardi Lognberg. Greinin ber á sama borðið og víst verður á, at ósemja eisini er í Tjóðveldi og at tað ljóðar, at ein javnaðartingmað ikki tekur undir við at skerja blokkstuðulin. Vit hava sambært hesi meting eina stjórn við innanhýsis trupulleikum, og tað er ikki nakað gott politiskt støði til fyrstu royndina við minnilutastjórn.

So mikið í stuttum um møguleikarnar sambært stjórnmálafrøðinginum. Hann metir sum nevnt eisini um fortreytirnar og varpar ljós á løgtingið og arbeiðsviðurskifti tingmanna. Hann heldur ikki umstøðurnar vera hóskandi til tey krøv, sum ein minnilutastjórn setur til skipanina. Skipanin er ov veik, og fyrisitingarliga hjálpin til tingmenn er ikki nøktandi. Tørvur er sum frøðingurin tekur til, á at hava hjálp knýtta at hvørjum tinglimi sær, sum tinglimurin og flokkurin kunnu brúka til at menna sínu egnu politisku visjónir og mál.

Hetta skal helst skiljast so, at hetta serstakliga er galdandi fyri andstøðutingmenn, tí ein støða við minnilutastjórn setur heilt onnur krøv til andstøðuflokkar- og tingmenn. Ein loysn hevði verið, at hvør tinglimur fær egnan skrivara. Stjórmálafrøðingurin kemur í nevndu grein til hesa niðurstøðu: Krøvini fyri at fáa eina dynamiska minnilutastjórn er, at andstøðan kann spæla við. Skal hon tað, er grundleggjandi neyðugt at geva løgtingslimunum betri arbeiðsumstøður….. Teir karmarnar hevur løgtingið ikki og tí er lítið sannlíkt, at okkara skipan ber eina minnilutastjórn uttan ein fastan stuðulsflokk. Hetta er eitt sera áhugavert sjónarmið, sum átti at givið øllum tingflokkum og landsstýrisfólkum nakað at hugsa um.

**Sosialurin**

## Sandoyartunnilin er ikki trupuleikin

EYÐGUNN SAMUELSEN
løgtingskvinna



Nú Gerhard Lognberg aftaná flokksleiðslufundin, sum hann rýmdi av innan fundurin var liðugur, heldur áfram at spilla út løgmann og onnur álitisfólk í flokkinum í fjølmiðlunum, má ein standa spyrjandi.

Fyri tað fyrsta tykist Gerhard Lognberg ikki at vita, hvør ið situr í flokksleiðslu flokksins, hvørji tey umboða og hvussu hesi verða vald. Tað kann tykjast løgi, men havandi í huga hvussu ofta hann er møttur á fundum í flokkinum, er tað kanska ikki so løgi kortini.

Hvørt valfelag í Javnaðarflokkinum eigur flokksleiðsluumboð í mun til limatalið. Valfeløgini velja sini umboð á aðalfundi, og verður hetta val staðfest á landsfundi. Formaðurin í valfelagnum er altíð flokksleiðsluumboð. Á flokksleiðslufundi kunnu varalimir og nevndarlimir í valfelagunum eisini møta, men hesi hava bert talurætt og ikki atkvøðurætt. Flokksleiðslan er hægsti myndugleiki millum landsfundirnar.

A landsfundi verður starvsnevndin vald við beinleiðis vali, har hvørt valfelag hevur atkvøðutal sambært tal av limum í valfelagnum. Hvør ið situr í starvsnevndini, sum er dagliga leiðsla floksins, kan síggjast á www.j.fo

**Tunnilssemjan sum Gerhard ikki tók undir við sigur soleiðis:**

**Sandoyartunnilin**

- Løgtingið samtykkir í ólavsøkutingsetuni at seta P/F Sandoyartunnilin á stovn við stovnsfæi.
- Samgongan semist um árliga upphædd, 50 mio kr, at seta í partafelagið.
- Projektering av Sandoyartunlinum verður gjørd í heyst.
- Uppskot til nýggja verklagslóg fyri Sandoyartunnilin verður lagt fyri Løgtingið í ólavsøkutingsetuni. Í verklagslógini verður staðfest, at farið verður undir Sandoyartunnilin tá eginognin hjá partafelagnum er 150 mio kr., sum er eftir at fíggjarlógin fyri 2011 er samtykt.

Henda semja inniheldur bæði dato fyri nær arbeiðið skal fara í gongd og pening til verkætlanina. Hóast tað tók Gerhard ikki undir við hesum, men valdi ístaðin at taka teppið undan sitandi samgongu. Hvussu hann nú kann fáa ein Sandoyartunnil, og hvør á tingi skal atkvøða hann ígjøgnum, er mær ein gáta, tá ið bæði Sambandsflokkurin og Fólkaflokkurin hava boðað frá, at teir taka ikki undir við tunnilssemjuni.

Eg eri farin ar ivast í, um sandoyartunnilin er einasta dagsskráin, ið Gerhard og onnur hava. Hetta eftir at hava verið kallað kallað quislingur, vera løgd undir ikki at vera javnaðarfólk og áhaldandi páhaldini hjá Gerhard um, at ongin er javnaðarfólk uttan hann, tí vit sambært Gerhard vilja minka blokkin, avtaka sjómannafrádráttin, minka fiskidagarnar og hækka pensiónsaldurin til 71 ár, eri eg farin at ivast í um sandoyartunnilin er einasta dagsskráin, ið Gerhard og møguliga onnur hava.

Viðvíkjandi luttøku floksins í samgongu við Tjóðveldi og Miðflokkinum og nevnda blokkniðurskurðin er at siga, at flokksleiðslan tók undir við bæði samgonguluttøkuni og innihaldinum i samgonguskjalinum. Hóast nøkur ikki vóru so fegin um orðingarnar um blokkin, so var hetta ikki gjørt til nakað kardinalpunkt. Breið semja var um, at rætt var at fara í hesa samgonguna, tí mett varð, at samgonguskjalið var á tremur við Javnaðarpolitikki. Eisini kann eg nevna, at síða 1 í samgonguskjalinum sigur, at øll átøk, harvið eisini niðurskurður av blokkinum, eru tengd at búskaparstøðuni.

Viðvíkjandi sjómannafrádrattinum er at siga, at hesin spurningur ikki er viðgjørdur hvørki í samgonguni ella í flokkinum.

Viðvíkjandi fiskidøgunum, so er tað stevna floksins at vit skulu verja fiskastovnarnar og hava eina burðardygga veiðu, so eisini okkara eftirkomarar kunnu halda áfram at fáa úrtøku úr fiskivinnuni. Nu fiskiskapurin av toski er farin úr 34.000 tonsum í 2002 og niður í 14.000 tons í 2007, má hvørt mansbarn skilja, at hetta ikki er burðardygt, og at vit ikki kunnu halda fram onki at gera. Tað er ikki bert nøgdin ið er minkað, eisini í peningi er úrtøkan minni. Tað snýr seg um eini 400 milliónir í mistari inntøku til samfelagið. Um tað er javnaðarpolitikkur ikki at vilja tryggja okkara búskaparliga grundarlag, so standi eg spyrjandi.

At Javnaðarflokkurin vil longja pensiónsaldurin til 71 ár, er beinleiðis ósatt. Eitt kjakupplegg er komið frá einum embætismannabólki, men hetta upplegg hevur ikki verið til politiska viðgerð enn. Okkara landsstýrismaður i almanna og heilsumálum, Hans Pauli Strøm, boðaði beinanvegin frá í fjølmiðlunum, at hetta tók flokkurin ikki undir við, eins og undirritaða og fleiri onnur í tingbólkinum frá tingsins røðarapalli hava sagt tað sama.

Samanumtikið má ein spyrja seg sjálvan, hvat tað er, ið Gerhard Lodnberg vil, tá ið hann tekur teppið undan møguleikanum hjá sínum egna flokki at sita við stjórnarvaldi, tá hann ikki tekur undir við tunnilssemjuni, ið vildi fingið sandoyartunnilin nærri veruleikanum enn nakrantíð, og síðst men ikki minst framhaldandi ber fram ósannindi um politikkin hjá flokkinum.

**Innsent tilfar**

Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.

Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni.

Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónsleiðari:** Kári Mikkelsen karim@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Tróndur Skaalum trondur@sosialurin.fo
Høgni Thomsen hogni@sosialurin.fo
Henrietta Hammer henrietta@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Dorit Hansen dorit@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Árni Joensen arni@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Ellebye Andersen alvin@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 frá kl. 8.00-20.00 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan $13^{30}$

**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.